# ER SUMMARIÐ AVLÝST?

So var summarið her. Í øllum førum sambært kalendaranum. Men eftir veðrinum at døma kundi mánaðurin tað sama itið oktober. Og nú siga forsøgnirnar í øllum førum tveir dagar við stormi.



**STORMUR**

*Vindurin kann koma upp í 24 metrar um sekundið komandi dagarar*

Eydna Skaale

Juli plagar at vera okkara besti mánaður til veður. Tað er nú, vit plaga at kunna nýta okkara mest summarsligu klæði og njóta náttúruna. Men tað verður so ikki reiðiliga enn. Tí sambært veðurforsøgnunum skulu vit fyrst ígjøgnum nakrar dagar av stormi.

Tað eru tvey lágtrýst, sum elva til keðiliga og sera ósummarsliga veðrið. Seinnapartin í morgin sigur hann skrið ella storm og regn. Mikudagin verður eingin bati, tí tá verður somuleiðis skrið ella stormur. Vit kunnu tó ugga okkum við, at tað tá verður ælingur heldur enn regn. Hósdagin til leygardagin verður eitt sindur frægari, hóast tað eisini verður nógvur vindur –heilt upp í hvassan vind, sum er 17 metur um sekundið.

Petur Skeel, sum er verðurmaður í Miðlahúsinum, sigur hetta vera sera óvanligt.

- Henda tíðin plagar at vera tann besta til veður, men her er bara stormur fyri framman nú.

Vit kunnu heldur ikki gleða okkum til nakran serligan hita, tí 14 stig verður helst hámarkið.

*eydna@sosialurin.fo*

# Útoyggjastevna í skiftandi veðri

## ÚTOYGGJASTEVNA Leygardagin leitaði fitt av fólki sær á útoyggjastevnu í Hesti

Dagfinn Olsen

Norðlýsið sigldi og Teistin sigldi til og frá allan dagin. Eisini leitaðu nakrir smábátar út í Hest.

Veðrið hevur tó ikki verið av tí besta leygardagin. Væl av vindi var tað mesta av degnum og tað regnaði ella sirmaði.

Hetta merkti eisini stevnuna í Hesti, sum hevði rúgvusmikla skrá. Men eittnú varð ætlaða útferðin út í Koltur avlýst.

Men veðrið var skiftandi, og tá stevnan varð sett klokkan 14:00 sá sólin.

Og fólk hugnaðu sær og vitjaðu skúlan, har framsýning var av ymsum heimavirkaðum. Har sást eisini eitt boð uppá, hvussu føroyskar matvørður kundu verið marknaðarførdar. Eittnú við lokkandi heitum og innpakking.

Ymsastaðni fekst ymiskt til matna, og fólk vóru blíð í Hesti, og bjóðaðu innar. Børnini sluppu eisini at royna hoppiborg og annað.

Á kvøldi var ymiskt á skránni, eittnú togtogan, diskotek í bygdastovuni og dansur við Moonlight á bryggjuøkinum.

*dagfinn@sosialurin.fo*



**STEVNA**

*Um vikuskiftið var árliga útoyggjastevnan hildin í Hesti*

*Mynd: Dagfinn Olsen*